# Esmar A. Jacobsen farin

**Hósdagin 6. juli andaðist Esmar A. Jacobsen, fyrrverandi trúboðari í Havn, 80 ára gamal.**



Esmar var í mong ár ein býarmynd í Havn, tá hann við sínum kvikliga gongulag sást ganga millum tey ymisku støðini, har hann hevði sínar tænastur. Hann var ein stillur eyðmjúkur maður og altíð við tí góða orðinum.

Esmar var ættaður og uppvaksin í Norðragøtu. Hann er nummar 4 av 13 systkjum. Foreldrini vóru Eliesar Jacobsen í Tjørnustovu og Sunnuva f. Heinesen í Súnastovu.

Hann gekk sjey ár í barnaskúla. Sum 16 ára gamal flutti hann til Havnar og fór í prentaralæru á Dimmalætting og var útlærdur hondsetari í 1946. Í 1947 gavst hann á Dimmalætting og fór til Bókaprent, har hann lærdi maskinseting. Ungdómsárini í Havn búði hann á KFUK. Hann var eisini ítróttarmaður og spældi við 1. deild hjá HB frá 1945 til 1949.

Í 1949 fór hann til Keypmannahavnar á fakskúla og meistaraskúla innan prentarayrkið, og starvaðist har í tvey ár. Hann kom heim aftur í 1951 og starvaðist eitt skifti í Prentsmiðjuni í Bókahandlinum. Sama árið var Prentarafelagið stovnað og Esmar var formaður fyrstu árini. Næstu árini arbeiddi Esmar á prentsmiðjuni hjá 14. September.

Hann gavst fyribils sum prentari, tá ið hann fór á bíbliuskúla í Hillerød í 1958. Valið, at fara á bíbliuskúla, grundaði hann á eitt innara kall um at gerast trúboðari. Árið eftir fór hann á trúboðaraskúla í Oslo, og var útlærdur í 1960. Næstu 5 árini var hann í parttíðartænastu hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum, og í hesum tíðarskeiði arbeiddi hann á »Einars Prent« hjá Einari Joensen, sum vísti honum vælvild, tá hann skuldi frá arbeiði í trúboðaraørindum. Esmar gavst við prentarayrkinum í 1965, tá ið hann gjørdist trúboðari burturav.

Sum trúboðari hevði hann reglulig møtir kring landið, og harumframt hevði hann vitjanartænastu hjá gomlum og sjúkum. Av tí sama var hann nógv at síggja á Landssjúkrahúsinum øll árini sum trúboðari, og hann vitjaði eisini á varðhaldinum eina ferð um vikuna í tilsamans 36 ár. Í 1962 kom hann upp í sjómansmissiónsarbeiði, og var t.d. sjómanstrúboðari í Vestmannaoyggjunum og eitt stutt skifti í Ravnoynni.

Sum trúboðari virkaði hann øll árini út frá Havnini, og gjørdist hetta arbeiði lættari og meira umfatandi, tá ið Missiónshúsið við Landavegin, sum var bygt við sjálvbodnari arbeiðsmegi, varð liðugt í 1972, soleiðis at møtir, sunnudagsskúli, blaðarbeiði, forlagsarbeiði, týðingar o.a. kundi gerast á einum og sams stað.

Sum trúboðari skrivaði hann 270 kristiligar hugleiðingar í 14. September og allar eru endurprentaðar í Sosialinum. 95 av hesum hugleiðingum komu út í bókini »Sáðkorn«. Sum yrkjari, undir heitinum Esmar Jacobsen Gata, gav hann út savnið »Fiólin« í 1956 og í 1990 kom nýtt yrkingasavn við heitinum »Tema við frábrigdum«.

Hann gjørdi eisini nógv við at týða andaligar bøkur, týðingar sum av fyrstan tíð vóru skrivaðar til Kirkjuligt Missiónsblað, sum hann stjórnaði sjálvurannar í umleið 30 ár.

Í 1952 giftist Esmar við Maud, sum er ættað úr Kollafirði, dóttir Sámal Andrias Djurhuus, Framman fyri Garða, og Thomassinu f. Thomsen, á Tanganum. Tey búsettust úti í Grønlandi í Havn. Har búðu tey til 1988, tá ið tey avgjørdu at flyta og keyptu hús við Landavegin.

Tey fingu 7 børn, harav 6 eru á lívi. Sámal Andrias, Eliesar, Súni, Ruth, Thordis og Erling. Erling Marni, sum varð føddur í 1961, doyði bert nakrar dagar gamal.

Seinastu tíðina búði Esmar á Tjarnargarði.

## Landsverk »skilti« boðskapin

Fyrr í vikuni høvdu vit myndir í blaðnum og eina grein við yvirskriftini »Hvussu skal ferðamaðurin finna til Klaksvíkar?«, har vit vístu á, at tað ikki var so lætt hjá ferðafólki, sum koyra í Føroyum, at finna til Klaksvíkar. Skelti manglaðu, og tey sum vóru, vóru villleiðandi.

Nú er skelti komið, sum vísir vegin til Klaksvíkar, og tey villleiðandi skeltini eru tikin burtur.

**mg.**




*Nú er hetta skelti sett upp í Leirvík við vegin sum gongur til Klaksvíkar*




*Hetta skelti vísir til Norðoyatunnilin á veg til Klaksvíkar, men tey sum koma úr Klaksvík vita framvegis ikki, um tey skulu til høgru ella til vinstru, tá tey koma til hetta vegamótið*

## Danskt skemt á Hafnia

Í kvøld, fríggjakvøldið, verður skipað fyri einum tiltaki, vit ikki eru heilt so von við her heima. Í Hafnia Lounge frá kl. 22.30 til 23.15 fer danski stand-up skemtarin Georg Sylvest Petersen at undirhalda fólk, tá hann fer at ganga runt millum áhoyrararnar, og herma eftir fólki, vit kenna so væl.

Stand-up skemt er eitt slag av skemti, sum danir av álvara hevur tikið til sín, men sum enn ikki hevur breitt seg í Føroyum.

Á Hafnia siga tey, at hetta tiltakið verður gjørt, fyri at fáa okkurt forkunnugt, øðrvísi og ikki minst stuttligt tiltak, og vóna tey á Hafnia, at fólkið fer at taka væl ímóti tí. Vísir tað seg, at so er, er góður møguleiki fyri, at talan verður um eitt afturvendandi tiltak.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu
tá kæri maður, pápi, sonur, beiggi og verfaðir okkara

**Hans Kristian Mikkelsen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum komu í heim okkara
og tykkum, sum ringdu og hjálptu okkum
á ymiskan hátt.
Tøkk fyri minnisgávur til Kristnastovu.
Somuleiðis takka vit øllum tykkum,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Arnhild, Mariann, katrin og Silja**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jonna Rasmussen,** f. Nielsen, ættað úr Havn, búsitandi í Sørvági, andaðist mikudagin 5. juli, 65 ára gomul. Andakt verður á Ellisheiminum í Vágum fríggjadagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jonnu, kunnu lata Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu. Konto í peningagastovnunum.

**Esmar Jacobsen,** fyrrverandi trúboðari, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 6. juli, 80 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin kl. 17.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 14. Tey, sum vilja minnast Esmar, kunnu lata eina gávu til Kirkjuliga Missiónsfelagið á konta í Føroya Sparikassa.

**Lítla Lív Wiegand Danielsen,** dóttir Guðrun Danielsen og Henrik Wiegand Hansen, andaðist í heiminum mikudagin 5. juli, 2 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju leygardagin kl. 13.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at
kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara.

**Esmar A. Jacobsen**
fyrrverandi trúboðari

Andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 6. juli
80 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum
leygarkvøldið kl. 17

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
sunnudagin kl. 14.

Vegna tey avvarðandi

**Maud**
**Sámal Andrias, Eliesar,**
**Thordis, Súni, Erling og Ruth**

*Tey, sum vilja minnast Esmar, kunnu lata eina gávu til Kirkjuliga Missiónsfelagið á konta 495.337.3 í Føroya Sparikassa*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum vístu samkenslu,
tá okkara kæru foreldur

**Mia F. Rubeksen og Ben W. Stokes**

vóru sett til teirra seinasta hvíldarstað
í kirkjugarðinum í Tórshavn.

Serstøk tøkk til Hera Joensen, prest,
sum gjørdi løtuna hátíðarliga.

**Janet, Ben John og Alan**